# Obama førir stórt

Ein nýggj meiningarkanning vísir at Barack Obama førir stórt ímóti John McCain. Kanningin er gjørd av Washington Post og ABC News gevur Obama 52 prosent av atkvøðunum, meðan McCain bert fær 43 prosent. Hetta er ein veruligur munur, í mun til seinastu kanningina, ið gav Obama 47 prosent og McCain 49 prosent. Frágreiðingin liggur helst í búskaparkreppuni í USA, sum hevur verið sera nógv frammi í miðlunum handan hav seinastu vikuna. Veljararnir hava eina ávíst álit á at Demokratarnir kunnu staðfesta USA sum búskaparliga stórveldið í Heiminum.





# Væntaði at skula samráðast í morgun

**Jenis av Rana var skakkur, tá hann vaknaði í morgun, tí til klokkan eitt í nátt, hevði hann saman við øðrum flokki sitið til samráðingar við Fólkaflokkin**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*- Vit mugu kanska meira enn nakrantíð vera varðhundar, sigur Jenis av Rana, um nýggja løgmann*

Jenis av Rana er ein ovfarin maður í dag. Við Sosialin sigur hann í morgun, at hann væntaði at skula upp til samráðingar um eina frælsissamgongu, sum formaður miðfloksins sjálvur orðar tað.

- Eg eri veruliga skelkaður. Sjálvandi ynski eg Kaj Leo Johannesen til lukku við løgmanssessinum, men tá eg vaknaði í morgun helt eg, at eg skuldi til samráðingar við Fólkaflokkin. Hvat er hent í nátt veit eg ikki, men eg haldi tað vera løgi sum teir hava prioriterað, sigur Jenis av Rana.

Hann heldur eisini at Fólkaflokkurin hevur borið seg óheppið at, og at teir eru vánaligir telvarar.

- Eg haldi Fólkaflokkin vera vána telvarar. Teir velja núeina borgarliga sambandssamgongu, heldur enn at velja eina frælsissamgongu, har Fólkaflokkurin enntá kundi fingið Løgmann, greiðir Jenis av Rana frá.

Sambært Jenisi av Rana sótu flokkar til klokkan eitt í nátt og smíðaðu eina møguliga frælsissamgongu.

- So seint sum í gjárkvøldið sótu vit á fundi. Tá klandraðustABC flokkarnir, og tí undrar tað meg veruliga, hvat er hent í nátt, sigur Tingmaðurin.

### Mugu vera varðhundar

Hann leggur samstundis ongan dent á at goyma, hvussu ónøgdur hann er við, at ABC-samgongan aftur er ein veruleiki.

- Komandi løgmaðurin er ein vit mugu ansað eftir. Vit vita ikki hvat hann kann finna uppá, tí vit kenna hansara hugsanir kring fosturtøku, skrásett parlag og ES. Tí mugu vit enn meira enn áður leggja stóran dent á at vera varðhundur, leggur Jenis av Rana dent á.

### Skrivstovumálið var liðugt

Um skrivstovumálið sigur Jenis av Rana, at tað sum Jóannes Ejdesgaard gjørdi í málinum, er eitt dømi um hvussu ljótur politikkur kann vera.

- Karsten Hansen var inni og meglaði, og málið var veruliga liðugt, tá Jóannes Ejdesgaard gróv tað framaftur, tí hann hevði innanhýsis trupulleikar í flokkinum, fyri at sleppa úr CHE-samgonguni, fortelur Jenis av Rana.

Eisini leggur Jenis av Rana dent á, at næstu tíðina, kanska enn meira enn áður, noyðist flokkurin at arbeiða hart fyri at verja tað andaliga, etiska og moralska.

# A og C hava selt ommu sína

**- Eg skal erliga viðganga, at slíkar gerðir sum tær hjá løgmanni, gera at eg havi ógvuliga lítið álit á hvat hendur í føroyskum politikki, sigur formaðurin í Tjóðveldi um støðuna í dag. Hinvegin sigur hann at flokkurin hjá honum fer at prioritera grundlógararbeiðið næstu tíðina**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal er harmur um, at ABC-samgongan er veruleiki, tí hann metir at onki hendi*

Tá Sosialurin í morgun tosaði við Høgna Hoydal, greiddi hann frá, at skilið í føroyskum politikki skelkar hann.

- Javnaðar- og Fólkaflokkurin hava selt ommu sína fyri lítið og lætt. Vit fáa eina borgarliga sambandssamgongu, og omaná gerðirnar hjá Jóannesi Eidesgaard í skrivstovumálinum sær ikki gott út. Afturat hesum er løgi at Javnaðarflokkurin aftur roynir hetta borgarliga samstarv, samstundis sum Fólkaflokkurin hevði góðan møguleika fyri eini aðrari samgongu, er hetta sum heild løgi, sigur formaðurin í Tjóðveldi.

Hóast tað, vil hann ynskja Kaj Leo Johannesen til lukku við løgmanssessinum, men leggur dent á at Tjóðveldi verður ein kritiskur og sterkur andstøðuflokkur.

Til skrivstovumálið sigur Høgni Hoydal, at tað er eitt serligt mál, teir beinanvegin vilja kanna út í æsir, fyri at reinsa flokkin. Sambært Høgna Hoydal verður eisini stórur dentur lagdur á arbeiðið við føroyskari grundlóg.

### Hava ávirkan

- Eg haldi tað vera løgi, at uttanríkisráðið, sum aðrir flokkar hava morlað niður í sand og øsku, at enda skal verða tað, sum næstan koppar øllum, men tað er sjálvandi gleðiligt at tað verður verandi, sigur Høgni Hoydal.

Hann leggur afturat, at sum hann hevur sæð í nýggja samgonguskjalinum, er tað mesta bara víðari frá tí sama, sum CHE-samgongan hevði, og at restin sær út til at vera uttan mál og mið.

Men sum heild er Høgni Hoydal ovfarin av tí sum hendir, men leggur dent á, at flokkurin eisini í andstøðu fer at gera alt hann er mentur, og at hann er harmur um at ABC-samgongan er ein veruleiki, tí har hevur mann sæð at onki hendi.

# Eitt løgi úrslit

**Sambært Kára P. Højgaard er nýggja samgongan eitt úrslit av løgnu gongdini, ið hevur verið í føroyskum politikki seinastu tíðina.**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Kári P. Højgaard metir, at mann ikki kann gera alt nú, og tað kann vera ein trupulleiki hjá ABC-samgonguni*

Kári P. Højgaard, formaður Sjálvstýrisfloksins meinar, at støðufesti er týdningarmesta málið í føroyskum politikki í løtuni, men dylur ikki fyri, at hann er ovfarin at ABC flokkarnir, sum kastaðu frá sær áðrenn jól og seinni royndu at semjast aftur, nú skulu vera førir fyri at skipa samgongu.

- Fyrst vil eg ynskja Kaj Leo Johannesen til lukku. Hann er ein óroyndur men reellur politikari, sum helst fer at vaksa við uppgávuni, og sum størsti flokkur er tað náttúrligt, at Sambandsflokkurin fekk løgmann. Men eg havi ilt við at skilja at hesir flokkarnir nú skulu kunna samstarva, sigur Kári P. Højgaard.

### Samstarvsavtalan

Eisini er hann sera vónbrotin av samstarvsavtaluni, sum Sjálvstýrisflokkurin gjørdi við CHE-samgonguna.

- Vit góvu CHE-samgonguni ein møguleika. Vit vistu at vit stóðu sterkir til at møguligt nýval, men valdu at geva teimum eitt tilboð. Teir tóku av, men brúktu tað ikki til nakað. Síðani vit fóru í tað samstarvið, hava vit bert hoyrt frá samgonguni tríggjar ferðir, og tað er á ongan hátt nøktandi, tá vit vóru í henni í ein heilan mánað, greiðir formaður Sjálvstýrisfloksins frá.

- Sjálvstýrisflokkurin hevur ikki roynt at snikka aðrar samgongur saman, tí tá flokkarerufarnirtilrealitetssamráðingar burdu teir fingið frið, sigur Kári P. Højgaard um luttøkuna hjá teimum í hesum samráðingarumfarinum.

Tó er hann fegin um at ein samgonga nú er, tí kanska hendan kann skapa stabilitet, og tað metir hann ikki tað hava verið seinastu átta mánaðirnar.

### Mugu vísa styrki

Sambært Kára P. Højgaard, hevur Føroyar í løtuni ein trupulleika, har tað ikki ber til at gera alt.

- Vit eru í einari støðu, har búskapurin ikki gongur so øgiliga væl. Tí mugu politikararnir leggja dent á at prioritera rætt, og ikki gera hesar stóru ætlanirnar við tunlum og so framvegis, sigur Kári P. Højgaard.

Eisini leggur hann dent á, at samgongan má stýra við hepnari hond, tí tað gevur trupulleikar, um tað ikki er. Men leggur afturat, at Sjálvstýrisflokkurin ikki verður ímóti, bara fyri at vera ímóti.